Nú skulu Páll og Bill hava hvør sín aðalstjóra

Av tí at báðir landsstýrismenninir í Trivnaðarmálaráðnum, Páll á Reynatúgvu og Bill Justinussen, skulu hava hvør sítt aðalráð, skulu teir eisini hava hvør sín aðalstjóra. Tí verður nú søkt eftir nýggjum aðalstjóra, sum skal hava góðar 46.000 krónur í løn um mánaðin

LØGMÁLARÁÐIÐ
Eirikur Lindenskov



At trivnaðarmálaráðið varð býtt sundur í tvey og fekk tveir landsstýrismenn, førir nú við sær, at landsstýrismenninir nú skulu hava hvør sín aðalstjóra…

Løgmansskrivstovan søkir nú eftir aðalstjóra til Almannaráðið. Orsøkin til hetta er, at Trivnaðarráðið verður býtt sundur í tvey, so at landsstýrismenninir ávikavist í familju- og heilsumálum og almannamálum, hava hvør sína fyrisiting.

Aðalstjórin er ovasti ráðgevi hjá avvarðandi landsstýrismanni og hevur ábyrgdina av dagligu leiðsluni, menningini og rakstrinum av Almannamálaráðnum. Almannaráðið fyrisitur almanna- og javnstøðumál.

Tann, ið settur verður sum aðalstjóri í Almannaráðnum, skal hava útbúgving frá lærdum háskúla og hava leiðsluroyndir frá almanna ella privata arbeiðsmarknaðinum ella útbúgving og royndir, ið kunnu javnsetast við hetta.

Umtráðandi er, at tann, ið settur verður, hevur evni at seta í verk fyriskipani, hevur nútíðar leiðsluegin-leikar, góð greiningarevni, innlit í politisk viðurskifti og vitan um tær treyitr, ið eru galdani í eini politiskari fyrisiting, sigur løgmansskrivstovan í lýsingini.

Dentur verður lagdur á persónligar eginleikar so sum evni til at eggja og menna leiðarar og starvsfólk, góð samstarvsevni, vilja til at royna nýggj virkisøki og áhuga fyri avbjóðingum.

Starvið er tænastumannastarv og er flokkað í 39. lønarflokki. Hetta gevur við føstum viðbótum 42.348 krónur 34 oyru um mánaðan umframt eina viðbót upp á 3.984 krónur 75 oyru fyri at vera aðalstjóri. Samanlagt fer nýggi aðalstjórin at fáa 46.333 krónur og 9 oyru í fastari løn frá landskassanum hvønn mánað. Ella 555.997 krónur og 8 oyru um árið.

Savna undirskriftir móti skrásettum parlag

SKRÁSETT PARLAG
Eirikur Lindenskov

– Valið stendur millum Bíbliuna og modernaðan heiðinskap, sigur Álvur Kirke í Kaldbak, sum hevur tikið stig til at savna undirskriftir móti lógini um skrásett parlag.

– Vit hava í seinastuni sæð, at arbeitt verður fyri at broyta Føroyar til eitt sekulariserað samfelag, sum byggir á humanismu í staðin fyri kristnu siðalæruna. Valið stendur millum Bíbliuna og modernaðan heiðinskap, sum verður kallaður humanisma, sigur Álvur Kirke í lýsing í blaðnum í dag.

Hann sigur, at til ber at skriva undir yvirlýsingina í nógvum kristnum samkomum og í nøkrum handlum og bensinstøðum kring landið.

– Eisini ber til at klippa lýsingina úr bløðunum, skriva eitt ella fleiri nøvn á, og senda hana aftur til mín áðrenn 12. oktober, sigur Álvur Kirke, sum fer at handa løgtinginum undirskriftirnar.

Í yvirlýsingini verður m. a. sagt:

»Vit, undirritaðu vilja við hesum siga frá, at vit vilja verja kristna siðaarvin.

Vit mótmæla ætlanunum um at broyta Føroyar til eitt samfelag, sum byggir á humanismu – ístaðin fyri á kristnu siðalæruna.

– Vit mótmæla ætlaða lógaruppskotinum um skrásett parlag fyri samkynd í Føroyum.

– Velja vit humanismuna fram um kristindómin, so fáa vit lógir, sum eru í stríð við kristna siðalæru og gamlan føroyskan sið - t.d. lóg um skrásett parlag fyri samkynd.

Vit eru ímóti mannamuni og allara happing. Lóggávan eigur at verja allar borgarar, so teir ikki verða fyri mannminkandi viðferð, verða happaðir ella verða fyri álopum. Allir borgarar skulu hava somu rættindi og somu skyldur. Tí er tað skeivt at geva ávísum bólkum serrættindi.«